## Súni í Viasat-finaluni



AaB var í serflokki í teimum báðum hálvfinalunum í Viasat Cup, sum eru spældar seinastu dagarnar. AaB spældi ímóti Esbjerg, og liðið úr Aalborg vann báðar dystirnar 4-0. Fyrri dysturin var í Esbjerg, og tann seinni var í Aalborg sunnudagin. Aftur sunnudagin eydnaðist tað AaB at vinna stórsigur. Súni Olsen hevur ikki verið við hesar báðar dystirnar, tí hann hevur verið skaddur. Fyrr í kappingini hevur hann spælt nógv við og skotið tvey mál. Finalan verður spæld í Aalborg, og hitt liðið í finaluni er FC Nordsjælland, sum samanlagt vann 4-0 á Silkeborg. Nú er at vóna, at Súni verður klárur at spæla við í finaluni.

## Lyngby-toppskjútti á veg í superliguna

22 ára gamli Morten Nordstrand hevur havt eitt rimmar ár í álopinum hjá Lyngby, sum spælir næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Nordstrand hevur mannað álopið saman við Christian Holst Lamhauge, og tað hevur gingið sera væl. Í 27 dystum hevur Morten Nordstrand skorað 27 mál, og tí er ikki so undarligt, at feløg í superliguni og uttanlands hava hildið eygað við honum. Nú skrivar onside.dk, at FC Nordsjælland er við at gera sáttmála við Morten Nordsstrand, so at hann næsta kappingarár skal spæla í superliguni.

# Rukku ikki málinum

**Føroyar endaðu á 82. plássi í 37. talvolympiaduni í Torino í Italia. Vinnari varð Armenia**

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Málið hjá Føroyum var 50 %, ella 26 stig. Tískil komu føroysku telvararnir so tætt at málinum sum til bar við teirra 25,5 stigum. 148 lond telvaðu við í OL og Føroyar vóru styrkismettar sum nr. 80. Lat okkum fyrst hyggja at toppinum.

Armenia vann óvæntað talvolympiaduna. Armenska manningin var óvanliga støðug ígjøgnum alla kappingina við 10 dystarsigrum og 3 javnleikum. Ongantíð var vandi fyri, at teir lótu tryggu leiðsluna frá sær. Armenia var mannað við tveimum sterkum 2700-telvarum – Levon Aronian (2756) og Vladimir Akopian (2706) – og sterkum 2600-telvarum, ið telvaðu sum sannir topptelvarar.

Kina tók tey flestu á bóli við teirra flotta 2. plássi, meðan USA og Ísrael endaðu á 3. plássi. Russisku favorittarnir endaðu á einum skuffandi 6. plássi. Vladimir Kramnik (2729), sum hevur hvílt í hálvt ár orsakað av sjúku, hevði tó framúr úrslit á 1. borði, og fekk heiðurin at hava hægstu avriksstyrkina í OL.

### Stjørnuskotið og legendan

Danir og norrmenn vóru væl við áðrenn seinasta umfar. Stórtap førkaðu tó bæði liðini nakað aftur eftir á stigatalvuni. 15 ára gamli Magnus Carlsen (2646) stóð seg væl við 6 stigum av 8. Hann nærkast alsamt 2700-markinum.

Hugaligt er at síggja hvussu væl 75 ára gamli Viktor Korchnoi (2611) framvegis kann telva. Hann hevur í umleið 30 ár telvað fyri Sveis, og í Torino fekk hann 6 stig av 10 á 1. borði. Úrslitið samsvarar við ratingtal hansara og tískil er hann framvegis omanfyri 2600-markinum.



*John Rødgaard spældi í OL sín 150. landsdyst fyri Føroyar. Her er tað Finnbjørn Vang, varaforseti í TSF, sum ynskir Rødgaard tillukku við runda talinum*

### Góðtikið

Úrslitið hjá Føroyum er á heilt góðari leið. Tríggjar ferðir vunnu Føroyar 4-0, og tað er óhoyrt. Hóast tað gekk væl í seinnu helvt, vórðu føroysku úrslitini sum heild ov óstøðug.

Við einum 3-1 sigri í 13. og seinasta umfari, høvdu Føroyar kunnað rokkið málinum (50%). Føroyingar vunnu tó »einans« 2,5-1,5 á Uruguay. Hans Kristian vann sítt talv, meðan John Arni Nilssen, John Rødgaard og Helgi Dam Ziska leiktu javnt. Serliga hevði Helgi møguleikar at vinna, og harvið fáa Føroyar upp á 50 %, men so varð ikki. John hevði somuleiðis góða støðu í endatalvinum.

John Arni, 31, stóð seg væl á 1. borði. Eins og Rødgaard, hevði John Arni eina góða seinnu helvt. John Arni telvaði ímóti fimm stórmeistarum og fekk samanlagt 2,5 stig móti teimum. Talvið hesa vikuna er sigurin hjá honum ímóti GM Amonatov (2569).

### Toppskorarin

51 ára gamli John Rødgaard stóð seg enn einaferð sera væl. John, ið nú hevur telvað yvir 150 landsliðstalv, varð toppskorari við 7 stigum av 11. Eftir tunga byrjan, vann Mr. OL fýra talv á rað og varð síðani tryggur seinastu umførini við fýra góðum javnleikum móti sterkari mótstøðu. Rødgaard hevur framvegis ómetaliga stóran týdning fyri føroyska landsliðið. Teir royndu menninir stóðu seg hesaferð betur enn ungu talentini.

Helgi D. Ziska, 15, telvaði flestu dystirnar hjá Føroyum. Bert eina ferð sat hann uttanfyri. Eins og John Arni, fekk Helgi 50% skoru. Hóast ongan norm á hesum sinni, prógvaði Helgi sítt støðið.

### Eykamaðurin slapp framat

Hans Kristian Simonsen, 22, reisti seg eftir sløk úrslit her heima á klettunum í seinastuni. Hans Kristian, sum varð úttikin sum eykamaður, slapp at royna seg heili tíggjur ferðir og fekk 5,5 stig. Liðleiðarin Finnbjørn Vang legði helst tíðliga í kappingini til merkis, at kollfirðingurin var í betri dagsformi enn Martin Poulsen. Tískil varð tað í roynd og veru Martin, sum varð eykamaður.

Á føroyska liðnum var tað nevniliga bert Martin Poulsen, 22, sum fall ímillum. Martin fekk 1,5 stig av 8. Telving hansara sveik á hesum sinni, men føroyameistarin er treiskur og kemur ivaleyst sterkt aftur. Leggið í geyma, at Martin hevði svarta fólkið í 6 av sínum 8 talvum, og at hann hitti sera sterka mótstøðu; 3 stórmeistarar (GM) og 3 altjóða meistarar (IM).

Í 2008 verður OL telvað í Dresden í Týsklandi.

## OL 2006 – endaliga støðan

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Armenia | 36,0 |
| 2 | Kina | 34,0 |
| 3 | USA | 33,0 |
| 4 | Ísrael | 33,0 |
| 5 | Ungarn | 32,5 |
| 6 | Russland | 32,0 |
| 7 | Frankaríki | 32,0 |
| 8 | Ukreina | 32,0 |
| 9 | Bulgaria | 32,0 |
| 10 | Spania | 32,0 |
| -------------------------------- | | |
| 17 | Svøriki | 30,5 |
| 19 | England | 30,5 |
| 20 | Danmark | 30,0 |
| 31 | Norra | 29,5 |
| 45 | Ísland | 28,5 |
| 52 | Skotland | 28,0 |
| 62 | Finnland | 27,0 |
| 82 | Føroyar | 25,5 |
| 148 | Virgin Islands(us) | 10,5 |

### Einkultúrslitini:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | John Arni Nilssen | 5,5 av 11 |
| 2 | Martin Poulsen | 1,5 av 8 |
| 3 | John Rødgaard | 7,0 av 11 |
| 4 | Helgi Dam Ziska | 6,0 av 12 |
| 5 | Hans Kristian Simonsen | 5,5 av 10 |

## Talvið hesa vikuna

**IM Nilssen, John Arni (2356) – GM Amonatov, Farrukh (2569)**

37th Chess Olympiad (8. umfar), Torino 29.05.2006

**1.d4 d5 2.c4 c6 3.Ric3 Rif6 4.e3 a6** (Eitt nógv leikt frábrigdi í slavisku byrjanini) **5.Rif3 Bf5 6.Rie5 Ribd7 7.Fb3 Fc7 8.cxd5 Rixe5 9.dxe5 Rixd5 10.Rixd5 cxd5 11.Bd2 e6 12.Rc1 Fd7 13.Be2 Be7** (Svartur hevur ongar trupulleikar) **14.Fb6 Bd8 15.Fb4 Be7 16.Fb6 Bd8 17.Fb4** (John Arni bjóðar við leikendurtøkuni óbeinleiðis stórmeistaranum javnleik) **17...f6** (Nei, hugsar stórmeistarin. Hann fer eftir sigrinum) **18.exf6 Bxf6 19.Bh5+ Bg6 20.Bg4 Kf7 21.0–0 Rhc8 22.Fb6 Bc2 23.Bc3 Rc6 24.Fb4 Rc4 25.Fb6 Rc6 26.Fb4** (Aftur her hevur svartur møguleika at taka javnt við leikendurtøku) **26...Bxc3 27.bxc3 Rc4 28.Fb2 Bd3 29.Bh5+ Bg6 30.Be2 Rc6 31.c4!** (Endiliga tykist tað sum John Arni fær loyst sína tungu støðu eitt sindur upp) **31...dxc4 32.Rxc4 Rxc4 33.Bxc4** (Knappliga er tað hvítur sum hevur lítlan fyrimun. Svarta e-finnan er veik) **33...b5 34.Bb3 Rd8 35.h4 Fe7 36.Rc1 a5?** (Fyrsti feilur hjá Amonatov. Kf8 hevði verið ein betur loysn, vekk úr bispalinjuni) **37.Fe5! a4??** (Amonatov fer fullkomiliga niður við høvdinum. Helst hevur tíðarneyð spælt ein leiklut) **38.Rc7! Rd7**

**Støðumynd eftir 38…Rd7**



**39.Fxe6+!!** (Vakurt og vinnandi!) **Fxe6 40.Rxd7+ Kf6 41.Bxe6** (John Arni hevur avviklað til vunnið endatalv) **41...Kxe6 42.Rd4 a3 43.Rb4 Bd3 44.Rb3 1–0**